TRYGD

P/F Trygd
Tryggingarfelag
Oknarvegur 5
Postboks 44
110 Tórshavn

Telefon +298 358 100
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Til Fiskivinnu- og samferðslumálráðið
Yviri við Strond 15
FO-110 Tórshavn

Dagf. 04.01.2024
/JRU

Viðv. Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu

Víst verður til skriv, dagfest 8. desember 2023, har Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur sent Trygd løgtingslógaruppskot til ummælis.

Innleiðandi ynskir Trygd at takka fyri møguleikan at gera viðmerkingar til lógaruppskotið, hvørs endamál samsvarar við tað hugsjón, ið Trygd eisini hevur tá tað snýr seg um gáloysni í ferðsluni ella el-rennihjól.

Viðmerkingarnar hjá Trygd framganga niðanfyri.

Viðmerkingar

El-rennihjól

Stóri váðin fyri persónskaða við el-rennihjólum er eyðsýndur, og ikki minni við verandi vegaumstøðum í Føroyum. Royndir frá øðrum londum, eitt nú í Danmark, har Odense Universitetshospital hevur skrásett gongd á persónskaðum við el-rennihjóli[1], vísa, at talan ikki er um vandaleyst akfar.

Við verandi vegakervi í Føroyum, har súkklubreytirnar eru fáar, metir Trygd somuleiðis, at tað ikki er ráðiligt at loyva el-rennihjólum í ferðslulógarinnar øki – Serliga við atliti til váðan fyri persónskaða á brúkarin, ið er illa vardur.

Harnæst meta vit við einum tryggingarliðum sjónarmiðið tað verða týdningarmikið, at lógin er greið í mun til tryggingarskylduna á hesum akførum, tá endurgjaldskrøvini kunnu gerast sera stór.

Um Landsstýrismaðurin seinni ynskir at gera nýggjar reglur um el-rennihjól, er tað okkara viðmæli, at talan í fyrstu atløgu verður um royndarætlan í avmarkaðum landafrøðiligum økjum, har samansetingin av vegakervinum talar fyri hesum.

Trygd hevur ikki ítøkiligar viðmerkingar til broyttu allýsingina annars.

[1] *Pressemeddelelse fra Ulykkes Analyse Gruppen - Antal skader efter ulykker med el-løbehjul ser aktuelt ud til at stige markant:* https://ouh.dk/media/kxcn04w5/el-l%C3%B8bhjul-pr-aug2021-t.pdf

TRYGD

Skeið um rúsdrekka og rúsevni

Trygd hevur umboð í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, og er tí partur av arbeiðnum hjá Ráðnum.

At víðkað um skeiðið samsvarar við fokusøkið, ið Ráðið hevur sett í sína seinastu Ferðslutrygdarætlan. Tað er ikki ókent fyri Trygd, at rúsevni eru ein vaksandi váði í ferðsluni, og vit síggja hvørt ár, at tað henda ferðsluskaðar, har rúsevni eru íblandað.

Fyri at tryggja eina virkandi og fyribyrgjandi lóggávu, er neyðugt at avleiðingarnar av rúsevnabroti og rúsdrekkabroti verða javnsettar.

Trygd sær broytingina frá R/F-skeið til RRF-skeið sum sera jaliga.

Handhildin samskiftistól

Broytingin í reglunum um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól er somuleiðis í tráð við fokusøkið, *Gáloysni*, hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Tað er fatanin hjá Trygd, at ein hækkað sekt saman við klipp í koyrikortið viðvirkar til minking av gáloysni í ferðsluni, og harvið um ferðsluskaðar. Trygd tekur tí undir við broytingini.

Vinarliga,

P/F Trygd